Sosialurin
# VARPIÐ
FRÍGGJADAGUR 19. mars 2004



**Leiðin til Perdition**

CANAL+

Michael arbeiðir fyri írsku mafiuna. Kona hansara og sonurin verða myrd, og hann gerst ógvusliga hevndarsinnaður. Ein leitan eftir drápsmonnunum byrjar. Hetta er ein spenningsfilmur við m.a. Tom Hanks og Paul Newman.

**Leygardagin kl. 19.00**



**Babe kemur til býin**

Eftir at hann er vorðin kendur fyri evnir síni sum seyðahundur, verður Babe móttikin sum hetja heima á garðinum hjá Hogget. Men alt verður ikki altíð eins gott. Hogget er fyri eini ferðsluvanlukku, sum Babe er orsøkin til, og tá hann ikki fær arbeitt meira, hóttir bankin við at taka garðin yvir. Loysnin tykist vera, at Babe og hini djórini fara at vinna pengar við framførslum, men lívið í stórbýnum er tó ikki altíð so lætt

**Fríggjadagin kl. 19.30**

**Bluff**

Ein vildi neyvan trúð tí, um besta vinkonan segði at, hon kundi síggja fram í tíðina, og kundi framsíggja, hvørji lotto-tølini fóru at verða. Allarhelst ikki, men tað er so júst tað, ið hendir hesuferð í Bluff – Louise fær vinkonurnar at trúgva sær. Og Tommy sigur vinunum, at hann »veruliga« er ein russiskur njósnari, sum var við til at fanga Saddam.

**Týsdagin kl. 19.35**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**